# ítróttur

Nr. 233 • mánadagur • 5. desember 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo


# Elspa vann NM-silvur

**Nærum trýkvart sekund varð skorið av føroyska metinum, tá Elspa Mørkøre um vikuskiftið vann silvur í norðurlendska juniormeistaraskapinum í 50 metra rygg. Hartil setti met-svimjarin úr Gøtu trý onnur føroysk met, og Jutta Thomsen setti eitt**



*Talan var um satt bragd, tá Elspa kvetti nærum trýkvart sekund av metinum á 50 metra rygg*

SVIMJING
*Jákup Mørk*

Besta NM-úrslitið í føroyskari svimjisøgu varð veruleiki um vikuskiftið.

Elspa Mørkøre, Jutta Thomsen, Dánjal Martin Hofgaard og Anna K. Eysturberg vóru føroysku umboðini á ferðini

**Fantastiska Elspa**

Serstakliga var tað Elspa Mørkøre, sum stjól føroysku yvirskriftirnar, so hvørt sum úrslitini komu á talvuna.

Besta úrslitið fekk hon, tá hon sum fyrsti føroyski svimjarin nakran tíð vann silvurmerki í NM-kapping. Hetta fekk hon, tá hon svam 50 metra rygg í tíðini 30,53 sekund. Hetta er ein betrin upp á ikki minni enn 71/100 sekund, og tað má sigast at vera heilt imponerandi.

Hartil setti unga gøtugentan eisini trý onnur met. Hesi vóru á 200 metra rygg, 50 metra frí og 100 metra frí. Í hesum seinasta er annars at viðmerkja, at Elspa fyri stuttum gjørdist fyrsta føroyska kvinnan, sum fór undir minuttin á teimum 100 metrunum. Hetta verður ofta sagt at vera eitt sálarligt mark, og koma svimjarar fyrst undir hetta, er ofta skjótt at koma enn longur niður. Tað staðfesti Elspa eisini um vikuskiftið, tá hon kom heilt niður á 59,74. Altso ein betran upp á heili 22/100 sekund.

Umframt silvurmerkið á 50 metra rygg, so gjørdist Elspa nummar fýra í 100 metra rygg. Í 100 metra frísvimjing varð hon nummar 8, meðan talan gjørdist um 10. pláss í 50 metra frí. Úrslit, sum ikki gerast minni imponerandi av, at Elspa bara er 14 ára gomul, og soleiðis eisini kann svimja í sama aldursbólki til komandi kappingar.

**Fleiri góð úrslit**

Tað var tó ikki bara Elspa, sum gjørdi um seg í Íslandi. Jutta Thomsen av Tvøroyri svam seg eisini til føroyskt met, tá hon kutaði nærum trýsekund! av metinum á 800 metra frí. Eitt avrik, sum setti hana á fimta plássið í kappingini.

Dánjal Martin Hofgaard betraði eisini um sítt persónliga met á 100 metra frí, tá hann svam teinin í 55,83 sekundum, og tó at hetta bara rakk til aftasta plássið, so var avrikið avgjørt góðkent.

Seinasti føroyski svimjarin var Anna K. Eystuberg. Hon var tó ikki heilt so væl uppløgd á ferðini, og svam væl seinni enn tað, sum hon áður hevur prógvað, at hon er før fyri.

# Bowlingin er nú skrásett

**Leygardagin varð fyrsta bowling-felag í Føroyum sett á stovn**

BOWLING
*Jákup Mørk*

Fimm ár eftir at bowlinghøllin á Hálsi læt dyrnar upp, er bowling nú eisini skrásett ítróttargrein í Føroyum.

Leygardagin hevði Havnar Bowlingfelag stovnandi aðalfund, og við hesum gjørdist væl umtókta ítróttargreinin eisini skrásett kappingargrein her á landi.

Fyrsti formaðurin í felagnum er Robin Clementsen, og afturat sær í nevndini hevur hann Eigil Olsen, næstformann, og Rolf Mouritsen, skrivara. Tiltakslimur í nevndini er Petur M. Hansen.

Í tíðindaskrivi sigur felagið, at eitt av fyrstu málunum hjá felagnum verður at skipa fyri eini bowling-kapping eftir altjóða reglum, og skal hendan ætlandi haldast tíðliga í komandi ári.

Enn eru onnur feløg ikki stovnað, men nú ítróttargreinin er skrásett, er ikki fjart at hugsa sær, at okkurt líknandi felag eisini verður sett á stovn í Eysturoynni, har tey nú eisini hava eina bowling-høll. Somuleiðis eru ætlanir komnar fram um eina høll í Suðuroynni, so tað er væl hugsandi, at havnarmenninir skjótt fara at fáa kapping í so máta.



*Gongst sum ætlað, verður fyrsta veruliga bowling-kappingin hildin um góðan mánað ella so*

*savnsmynd*

## Tommy verður fremsti 12. maðurin

Eftir at hava verið í formansloysi í eina tíð, hevur 12. maður, sum er føroyska áskoðarafelatið hjá fótbóltslandsliðnum, funnið sær nýggjan formann.

Nýggjur maður í sessinum er Tommy Falkenberg, sum er ein av teimum heilt trúgvu áskoðarunum hjá føroyska fótbóltslandslønum.

Hann hevur verið í nevndini hjá 12. manni síðani 2003, og á heimasíðuni hjá 12. manni, www.footballsupporters.fo, hava tey alt gott at bera honum fyri avrikini, sum hann hevur gjørt fyri felagið síðani tá.

Í nevndini hjá felagnum eru harumframt Jónleif Frederiksen, Janus Rein og Regin Egholm. Enn vantar ein limur, áðrenn nevndin er fullmannað, men hesin verður helst funnin í komandi ári.

**-mørk**

## Luxemburgo fekk sekkin

Bara 11 mánaðir eftir, at hann varð settur í venjarastólin, hevur Real Madrid givið Wanderley Luxemburgo sekkin

Tað vóru boðini, sum 53 ára gamli brasilski venjarin fekk frá leiðsluni í felagnum, sum hevði kreppufund sunnudag.

Real Madrid vann annars leygardagin fyrsta sigurin í fimm dystum, men 1-0 sigurin á Getafe var tó ikki nóg mikið til at sannføra nakran í felagnum.

Fyribils verður tað hjálparvenjarin, Juan Ramon Lopez Caro, sum fer at standa á odda fyri Real Madrid liðnum.

**-mørk**

## Everton vil hava Keana

Venjarin hjá Everton hevur avdúkað, at felagið hevur havt samráðingar við Roy Keane

Dave Moyes sigur, at hann hevur tosað við Keane um ein møguligan sáttmála, men enn er einki komið uppá pláss. Fleiri onnur feløg hava eisini ligið framvið eftir undirskriftini hjá Roy Keane, men enn er einki ítøkiligt komið burturúr.

Stóri spurningurin er, um Roy Keane er sinnaður at góðtaka eina lønarlækking í einum nýggjum felag. Tey flestu feløgini hava nevniliga ikki ráð at rinda somu løn, sum Keane fekk í United.

**-mørk**